## Rógvi Jacobsen skoraði aftur



Rógvi Jacobsen var millum málskjúttarnar, tá IL Hødd vann 3-1 á Kristiansund BK í venjingardysti í gjár. - Uppi í topp eru Rógvi Jacobsen og Joachim Magnussen støðugar hóttarnir og vinna flestu nærdystirnar. Báðir komu eisini á máltalvuna og tað er frálíkt. Tað gongur væl hjá føroyska landsliðsleikaranum í IL Hødd, Rógva Jacobsen. Klaksvíkingurin var aftur í dag millum málskjúttarnar, tá liðið vann við trimum málum móti einum í venjingardysti móti Kristiansund BK. Hann økti til 3-1 í seinastu minuttunum. Hetta skrivar heimasíða felagsins.

## Nygaard í Randers

Í gjár spældi hálvi føroyingurin Marc Nygaard sín fyrsta dyst fyri danska felagið Randers. Dysturin var í steypakappingini, og Randers var á útivølli ímóti Brøndby. Vertirnir løgdu seg á odda 2-0, áðrenn Randers minkaði um munin til 2-1. Dystirnir um vikuskiftið vóru í fjórðingsfinaluni í steypakappingini, og komandi vikuskiftið byrjar landskappingin aftur.

Neistin-Kyndil 31-25 (16-9):

# Dýr útvísing

**Tað kostaði nógv, tá Kyndils-málverjin fekk eitt diskutabult reytt kort. Og so hevði Neistin ongar trupulleikar av at vinna grannauppgerðina**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Við sigrinum á Kyndli eru Neista-kvinnurnar nú bert ein dyst frá FM-finaluni*

Við útlitum fyri fjórða sigrinum á rað móti grannunum hevði Kyndil sítt at stríðast fyri, tá tær sunnudagin spældu móti Neistanum.

Neistin hevði hinvegin finaluplássið at spæla fyri, og fyrstu longu løtuna tóktist hetta viga nógv meira enn setningurin hjá Kyndli.

Í øllum førum var Neistin flúgvandi fyri steðgin. Kyndil hevði als ikki sama flog, sum liðið hevur havt í nógvum av dystunum síðani jól, og alt bendi á ein veruligan stórsigur til mest sum endurreista Neistaliðið.

### Dýrt reytt kort

Tað er tó ein støða, sum verður í fokus, tá dysturin sunnudagin skal eftirmetast. Nevnliga reyða kortið, sum Guðrun í Lágabø fekk, tá lítið korter var farið av seinna hálvleiki.

Kyndil reistist nevnliga veruliga eftir steðgin. Kanska hildu tær bláu, at nú var sloppið, og tí høvdu tær ilt við at finna rætta gearið aftur. Og hinvegin hevði Kyndil so ongar ætlanir um at sleppa grannunum soleiðis uttan víðari.

Ein spruttandi Jacklin Durhuus gav bláu verjuni svárar trupulleikar, og tá viðspælararnir eisini fylgdu við, minkaði munurin millum liðini við fullari ferð. Efitr bara 10 minuttum var hesin komin niður í tvey mál, og tó at Neistin aftur økti, tá tær eina løtu spældu í yvirtali, var verulig tendring komin í dystin.

Vendipunktið kom, tá Neistin ætlaði sær í skjótálop. Guðrun var komin út úr málinum, men tá hon sá Anju Heinadóttir koma rennandi, steðgaði málverjin púrasta upp. Dómararnir mettu tó, at málverjin aktivt bremsaði mótspælaranum, og so varð ostaskorpan tikin úr lummanum. Og so kundi tað gera tað sama, at bæði málverjin og bonkurin harðliga mótmæltu avgerðini.

### Ein setningur eftir

Fyrst og fremst, so kostaði hetta Kyndli fyrstavalið millum stólparnar. Annað var, at hetta samstundis tóktist køva spælihugin hjá liðunum fullkomuliga. Við sjey málum á rað punkteraði Neistin allan spenning í dystinum, og nú er finalan eitt stórt fet nærri hjá teimum bláu.

Ein uppgáva er tó eftir. Komandi vikuskiftið skal Neistin inn á Skála at spæla móti StÍF í einum dysti, sum skal vinnast. Áður hava tær bláu havt sínar trupulleikar av StÍF, og tí eru tær fullgreiðar um, at hetta undir ongum umstøðum verður lætt.

Kyndil hevur tá enn ein fingur við í spælinum. Snávar Neistin, so er tað VB, sum kann taka yvir við einum sigri, tá tær vitja hjá júst Kyndli.

## FAKTA

**Neistin-Kyndil 31-25 (16-9)**
10 min: 4-2
20 min: 13-6
40 min: 18-16
50 min: 24-18
**Málskjúttar**
**Neistin:** Nicolera R. Hansen 7, Rakul Augustinussen 7(4), Anna Clementsen 7, Unn J. Kragesteen 4, Ása á Neystabø 4(1), Ása Christiansen 1
**Kyndil:** Jacklin Durhuus 7, Lina Andriulyte 4, Tordis Tróndarson 4, Randi Wardum 3(3), Hildur Høghamar 2, Barbara Egilstrøð 1, Bjørg Syderbø 1, Ronja Mikkelsen 1, Eyðritt Andreasen 1, Ragnhild á Plógv Hansen 1
**Brotskøst:** Neistin 6, Kyndil 4
**Útvísingar:** Neistin 3, Kyndil 4
**Diskvalifikatión:** Kyndil 2 (Eitt beinleiðis reytt og eitt 3X2 minuttir)
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen.

Stjørnan-StÍF 28-22 (17-9):

# Finaluklárar

**Í Klaksvík verður bara bíðað eftir FM-finalunum. Hesa ferð fekst tíðinat ganga við ætlaða sigrinum á StÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast StÍF ofta hevur givið Stjørnuni trupulleikar, so var eingin ivi um, at Stjørnan var favorittur sunnudagin.

Og tann leiklutin livdu tær eisini alt fyri eitt upp til. Heldur enn at byrja í eini dølskari leikferð, setti Stjørnan hesa ferð tempo á frá fyrsta bríksli, og tað gekk heldur ikki long tíð, áðrenn munur veruliga kom millum liðini.

Eftir hetta hevði heimaliðið ráð at taka tað meira róligt, men hóast hetta, so var sigurin ikki í vanda eitt einasta sekund. Um nakað, so var spurningurin bara, hvussu nógv meistaranri vildu leggja fyri, og tann parturin gjørdist minni, sum minuttirnir gingu.

Við bert einum dysti eftir at spæla tykist Stjørnan framvegis vera væl tendrað. Og tær eru enn ikki dornar í vandamestu grøvina at taka sær av løttum, nú so stutt er eftir, til tað aftur verður álvari.

Hjá StÍF er árið sum so eisini liðugt. Tilveran í deildini er væl og virðiliga bjargað, og so hava tær kanska ikki tað stóra at hugsa um. Men tær hava enn ein fingur við í spælinum um, hvør skal spæla finalurnar móti Stjørnuni. StÍF spælir nevnliga á seinasta leikdegi móti Neistanum, sum skal vinna tann dystin, skulu tær verða partur av finaluni.

## FAKTA

**Stjørnan-StÍF 28-22 (17-9)**
10 min: 7-3
20 min: 12-5
40 min: 19-12)
50 min: 24-17
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Simona Petersen 11(5), Joan M. Djordjevic 4, Anna Kristina Samson 4, Maria við Neyst 3, Durita Ljósstein 2, Bára S. Klakstein 2, Edith Hansen 1, Durita Christophersen 1
**StÍF:** Rebekka Justinussen 8(3), Ninna K. Joansen 8(1), Sunfríð Johansen 3, Rósa Johansen 2, Oddrún Danielsen 1, Johanna í Króki 1
**Brotskøst:** Stjørnan 5, StÍF 5
**Útvísingar:** Stjørnan 4, StÍF 2
**Diskvalifikatión:** Stjørnan 1 (3X2 minuttir)
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen